gini 2007:

# enn vill...



*Erla Marita Askham er ein av teimum spennandi nýggju nøvnunum á Ólavsøkuframsýningini*



*Myndin hjá Heiðriki á Heygum er ikki ólík kendu myndini av gentu við perluoyraringi hjá Vermeer*

framsýningini hvussu mong ung evnarík listafólk vit eiga.

## Tað psykodeliska

Ein av teimum mest evnaríku listafólkunum er Heiðrik á Heygum, sum umframt sín leiklut sum kurator, luttekur á framsýningini við trimum avarellum, sum allar hava felags myndevni úr søguni um Alice í undurlandi. Tað er serliga tann mittasta myndin við heitinum "Alice", sum vísir framúrskarandi evni Heiðriks til myndagerð. Koyr mannin á akademiið í stundini!!! Myndin er av eini ungari gentu, sum sæst í ¾ profil hyggjandi út móti áskoðaranum við einum tári úr vinstra eyga og einum grísi í fanginum. Hon er ikki ólík vøkru lýsingini av gentu við perluoyraringi hjá Jan Vermeer. Á sama hátt sum í barokktíðini er eitt nú andlitið upplýst, meðan bakgrundin er púra myrk. Barokkmyndir eru m. a. eyðkendar av hesum ljósáringinum, ið nevnist clair obscur, eins og tær tykjast sera uppstillaðar og estetiskar. Hetta sama er galdandi fyri myndirnar hjá Heiðriki. Úttrykkið kenst ektað kensluborið, samstundis sum okkurt kitsch-kent er yvir gentuni, ið hyggur so bønandi uppá áskoðaran eins og grátandi sigoynarabarnið, ið mong høvdu hangandi eina tíðina. Grísurin leggur eyka dent á absurda dámin, sum jú eisini er yvir søguni um Alice. Tað surrealistiska og psykodeliska hevur stóran áhuga millum nógv av teimum ungu, t.d. Bruno Eysturstein, sum t.d. hevur myndprýtt fleiri fløguhúsar. Hansara listarliga úttrykk tykist rættiliga ungt og hansara landsløg minna um tílík, sum eitt nú síggjast á heavy metal útgávum. Og mitt í øllum hongur ørvitisfiskurin, Tournesol professari og dinglar sum eitt pendul og tað er nokkso megaskeg og fínasta slag og hvat tey ungu annars plaga at siga. Bruno ætlar sær undir víðari útbúgving innan myndlistina og tað er gott. Erla Marita Askham hevur eyðsýniliga framsýnt á Ólavsøkuframsýningini fyrr, men hesa ferð fær hon uppiborna eftirtekt í stóra verkinum, sum er myndað av trimum løriftum, ið lýsa eina kvinnu, sum í sminku frá í gjár og tilhoyrandi g-strongi og sokkahaldarum, reinsar eina vesikummu, meðan eitt barn situr á gólvinum við síðuna av og lesur. Hugburðurin er sosialrealistiskur, gerandisligur, meðan stílurin er sera einfaldur, naivur og teknirøðlíkur. Litirnir eru lutfalsliga fáir; hetta er ikki málarí, sum leggur dent á málandi kolorismu og valørir, men á sjálva søguna, ið verður søgd um gerandisdagin hjá eini mammu. Vit hava ikki nógv av slíkari list í stórum formati í Føroyum og tað er at vóna, at Erla Marita Askham, ið sambært myndaskránni er mestum óskrivað blað í føroyskum listahøpi, fer at fáast meira við myndlistina í framtíðini.

## Aldursmarkið burtur

Ringt er at spáa um framtíðina, men tað skuldi verið lutfalsliga vist, at Ólavsøkan verður aftur næsta ár og harvið eisini Ólavsøkuframsýningin. Vit vita ikki hvussu hon verður fyriskipað, men mín vón er, at aldursmarkið verður tikið burtur. Alt gott um hesa framsýningina, men hon hevði ikki verði verri av, at nøkur eldri listafólk luttóku. Aldur er so merkiligt fyribrigdi og summi gerast yngri, tá tey blíva eldri. Nakað av tí mest spruttandi ungdommiliga, eg havi upplivað innan føroyska list, eru akvarellirnar hjá Ingálvi av Reyni, sum hann gjørdi, tá hann var um tey fýrs.